## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og eitt skifti regn. Seinnapartin hækkar hann upp í vestan og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men kanska onkur sólglotti. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men týsdagin minni vindur og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 8 stig.

# Sjáldsamur fongur í Vágsbotni

**Tað var ikki hissini fongur sum tey seks børnini í Frítíðarskúlanum í Drotning Ingrid Barnagarði fingu seinnapartin í gjár.**

**FONGUR**
*Orð & mynd: Snorri Brend*

Neyvan er tað gerandiskostur ella gerandisfongur at fáa eina havtasku við glúpi – og so heilt inni við land!

Hetta var kortini júst tað sum børnini upplivdu, tá tey við glúpi og spannum fóru oman í Vágsbotn ígjár. Ætlanin var m.a. at fanga ternumurtar, men tað var kortini ein nógv størri fongur tey fingu.

Tey fingu einki beinanvegin, men løtu seinni kom róp í, tí nú hevði tað eina starvsfólkið veruliga fingið fong: Eina havtasku. Hvørki børnini ella tey vaksnu vistu, hvat fiskaslag talan var um, men nakrir eldri menn vistu tó at siga frá hesum.

Ikki sørt errin komu tey øll niðan til barnagarðin við sjáldsama fonginum. Hetta vakti sum vera man miklan ans millum børn, starvsfólk og foreldur.

Jú, ein minniligur dagur í Vágsbotni.



*Børnini í barnagarðinum flokkast rundan um ílatið við sjáldsama fonginum*



*Vanliga eru tey seks børn í frítíðarskúlanum, men á myndini eru bert fimm teirra: Andreas, Mia, Josva, Katrina, Ingi og Iðunn, saman við starvsfólkunum Tórun og Margretu*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | -- |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -2 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 14 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 8 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 11 |
| Keypmannah. | 11 |
| Helsinki | -1 |
| Moskva | 3 |
| Berlin | 13 |
| Warzawa | 8 |
| Kiev | 3 |
| Bukarest | 6 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 20 |
| Róm | 20 |
| Malorca | 23 |
| Athen | -- |
| Malta | 22 |
| Tunis | 24 |
| Beijing | 19 |
| New Dehli | 28 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | -- |
| New York | 20 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 25 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | --- |
| Buenos Aires | 22 |

### LUFTTRÝSTIÐ







**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1036 hPa. yvir Írlandi fer spakuliga í landsynning. Eitt lágtrýst, 1005 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum ferí landnyrðing log brúgvalagið haðani til havið sunnan fyri Ísland fer um Føroyar fríggjadagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 31/10 kl. $06^{00}$– 1/11. $06^{00}$. Hitin í gjár: 4,2°
Minsti hiti máldur í november: - -7,2° - Mesti hiti máldur í november: 12,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 17/10 kl. $06^{00}$– 18/10 kl. $06^{00}$ Avfallið higartil í oktober: 0,0 mm

GEVIÐ BLÓÐ

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

29. oktober Fyrra kvarter
3. november Mánin næstur jørðini
5. november Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. Nov. | 03.20 | 15.42 | 02.20 | 14.42 | 02.35 | 14.57 | 05.20 | 17.42 | 06.20 | 18.42 | 01.35 | 13.57 | 00.35 | 12.57 | 03.35 | 15.57 | 04.35 | 16.57 | 03.05 | 15.27 | 04.20 | 16.42 |
| 3. Nov. | 04.04 | 16.27 | 03.04 | 15.27 | 03.19 | 15.42 | 06.04 | 18.27 | 07.04 | 19.27 | 02.19 | 14.42 | 01.19 | 13.42 | 04.19 | 16.42 | 05.19 | 17.42 | 03.49 | 16.12 | 05.04 | 17.27 |
| 4. Nov. | 04.50 | 17.16 | 03.50 | 16.16 | 04.05 | 16.31 | 06.50 | 19.16 | 07.50 | 20.16 | 03.05 | 15.31 | 02.05 | 14.31 | 05.05 | 17.31 | 06.05 | 18.31 | 04.35 | 17.01 | 05.50 | 18.16 |
| 5. Nov. | 05.42 | 18.08 | 04.42 | 17.08 | 04.57 | 17.23 | 07.42 | 20.08 | 08.42 | 21.08 | 03.57 | 16.23 | 02.57 | 15.23 | 05.57 | 18.23 | 06.57 | 19.23 | 05.27 | 17.53 | 06.42 | 19.08 |

5 707265 100050